

*Petur Mohr Dam við skúlaflokki. Gerda dámdi hann sera væl sum lærara*



*Mammubeiggin Sigurd og Dorthea úr Skopun, sum endaðu í Kanada*



*Mammubeiggin Gunnar var bæði framúr sum fakfelagsmaður og sum menniskja*

skýggjaðir. Eg føldi tað sum at fólki vendi sær burtur, tá ið eg hitti onkran.

Tað var tað sama, tá farast skuldi í býin í Havn. Tá farið varð við bussi var bussurin bert fyri sjúklingar. Tá vit skuldu síggja kappróður á ólavsøku var tað umborð á Reyða Krossi, so vit ikki vóru millum fólkið.

Her vóru nógvar skepnir á sanatoriinum. Eg hitti ein sjúkling, sum hevði ligið har í 20 ár. Tað var vist sjáldsamt. Men nógv lógu í áravís. So var tað ein 18 ára gomul gentu, sum bert lá ein mánaða, tá doyði hon.

Ein kendur sjúklingur var Mikkjal á Ryggi, sum fyri kortum hevði 130 ára "føðingardag." Eg minnist, tá ið hann hevði yrkt ein nýggjan sang, marsjeraði hann aftur og fram eftir gólvinum og las hann upp. "Hvat halda tit um hetta?" spurdi hann.

Onkur slapp heim, hóast hann ikki var komin heilt fyri seg. Men so kundi henda, at hann ansaði ikki nógv væl eftir sær og kom inn aftur.

Tá sjúklingar vóru so leingi innlagdir, fingu teir ymisk ítrív. Eitt dømi var at gera øskubikar av horni umframt nógv annað.

Eitt serligt upplivilsi var, tá fiskimenn komu niðan í Hoydalar at vera tuberklakannaðir. Teir komu niðan í bussi. Fyrst varð tikin eina blóðroynd og síðani varð farið í røntgentólið, har Magnussen sat. Tað kom javnan fyri, at stórir og prúðir menn svímaðu av sproytuni, tá teir sóu blóðið renna úr nálini. Eina ferð svímaðu sjey manns. Sjúkrasystrarnar vistu, hvørjir teir vóru, sum plagdu at svíma, og tær høvdu ein stól kláran til teirra.

## Til T.F. Thomsen

Eg var heima í einar tríggjar mánaðar eftir at eg fór frá Uttara Handil. Hetta dámdi mær væl, tí eg hevði arbeitt so nógv úti. Tá ringir Tummas Thomsen frá T.F. Thomsen og spyr, um eg ikki kundi komið og hjálpa sær í einar tríggjar mánaðir at avrokna skipini. Tað kundi eg koma, um tað bert var hálvan dag.

Georg Thomsen var stjóri. Tað var ógvuliga áhugavert eisini. T.F. Thomsen er jú elsta fyritøka í landinum. Har eru fult av gomlum skjølum og eina dagbók fyri hvørt ár. Vit plagdu at lesa í hesum gomlu bókum. Har vóru brøv millum annað frá fiskakeyparum í Spanien.

So fekk eg oljuna at avgreiða. Thomsen fekk eisini umboðan fyri DFDS at selja bilettir til teirra ferðamannaskip. Eg skuldi vera tríggjar mánaðir, men eg bleiv 8-9 ár.Tað var eitt deiligt arbeiðspláss, tí arbeiðsgevarin var so fittur, og man føldi seg heima har.

## Sá Marité aftur

Marité var í rakstri fram til 1973 og harvið alla mína tíð í Uttara Handli. Ì 1978 varð hon seld til Svøríki, har hon varð sett í upprunastand og skuldi nýtast til at sigla við í svenska skergarðinum.

Eg havi sæð hana eina ferð aftur. Hetta var á Langlinje í Keypmannahavn til eina regattasigling. Tá ið eg og Poul komu gangandi segði Poul, at hasa hekkuna kenni eg. Tá sær hann eisini, at navnið Marité stendur á hekkuni. Hann fór so umborð at heilsa uppá teir. Tað fyrsta, hann segði, var, at her luktaði ikki sum við Marite í gomlum døgum. Nú luktaði av parfymu. Her var alt so flott.

So fortaldi Poul, at eg hevði arbeitt í reiðarínum hjá Marité. Tá var einki óført við blíðskapi. Eg fekk bókling við søguni hjá Marité, t-skjúrtur og tílíkt.

## Yvirísing undir Íslandi

Poul noyddist at støðga við arbeiðinum, sum motorpassari, av tí at hann fekk oljueksem, og fór tí at arbeiða í landi, meðan hann fekk viðgerð fyri eksemið. Hann arbeiddi millum annað sum hjálparmaður hjá Groth Larsen, sum var radiomekanikari og hevði el-arbeiði umborð á skipunum.

Í 1956 fóru Poul og beiggi hansara Anthon til Íslands at fiska við trolaranum Ísborg av Ísafirði. Ein beiggi hansara, Helge, kallaður Lilleba, sigldi sum kokkur við Sólborg, sum var eitt systirskip.

Tað var sera kalt og Ísborg varð yvirísaður. Trolarin fór so langt á síðuna, at aðrir sóu botnin á honum, og teir vóru bangnir fyri at fara runt.

Pól fortaldi, at Anthon var í lastini, og teir máttu bara skalka til, so hann var einsamallur har niðri og ikki visti, hvat ið gekk fyri seg. Men so fingu teir banka so nógv av ísinum, at hann rætti seg aftur.

So fingu teir eitt trol um skrúvuna. Tá varð Poul heisaður niður aftanfyri á einum bretti fyri at skera hetta netið av. Hann kundi eins væl verið sligin upp undir hekkuna. Poul var altíð so djarvur.

## Fóru at reka hotell

Í 1958 keyptu vit Hotel Tveraa, sum var sum eitt vanligt hús til støddar. Vit lyftu tað upp og fóru at reka Hotel Tvøroyri, sum opnaðu 27. mai 1959. Vit høvdu um hetta mundi ein døgurða fyri løgtings- og landstýrismonnum, sum vóru her suðuri og tóku ímóti Leivur Øssursson, sum var bygdur í Portugal. Vit keyptu húsið frá Mervin og Any Dimon. Tað var faktisk beiggi Poul, Helge, sum var kokkur, ið vildi hava okkum við. Hann vildi helst ikki vera einsamallur um at reka tað. Eg skuldi gera roknskap og tílíkt, men tað endaði so við, at vit keyptu tað saman.

Í 1970 byrjaðu vit at grava tað út so hotellið gjørdist so stórt sum tað er í dag.

Fyrstu gestirnir vóru krúnprinsessa Margretha og Hendrik, sum vóru á vitjan í Føroyum i 1971. Tá varð hildin móttøka fyri teimum á hotellinum. Tað var nokk so stuttligt.

Tað gekk væl við hotellinum at byrja við, men tað var ymiskt sum gekk illa í hond.

Hotellið gav ikki nokk av sær til at løna fleiri fólkum, tí hevði Poul og Helgi eisini annað arbeiði meðan vit róku hotellið. Poul var portørur og koyrdi ambulansan á Suðuroyar Sjúkrahúsi í 32 ár. Harumframt koyrdi hann taxa.

Helge fekk seinast í sjeytiárunum eina heilabløðing. Aftaná tað var hann tíverri ikki fult arbeiðsførur.Tað var sera hart, men vermamman Poulina og svigarinnan Kristianna, vóru har hvønn dag og hjálptu til.

Jólastormurin í 1988 var eisini eitt bakkast, og hotellið fekk stóran stormskaða, sum vit einki fingu fyri. Tekjan á húsinum niðanfyri varð lyft upp í heilum líki og feyk á hotellið.

Men so bleiv Poul so sjúkur. Hann fekk blóðpropp. Hann plagdi tó at halda náttarvakt. Tá eg kom heim um hálvgum 12 tíðina av hotellinum, fór hann til arbeiðis.

Men seinast í 1991 máttu vit gevast við hotellinum.

## Jona avbestilti Smyril

At tað bar til at gista umborð á Smyrli, meðan hann lá á Tvøroyri, gjørdi nógv fortreð fyri hotellið. Hetta var fyri at sleppa fólki frá at fara so tíðliga upp morgunin eftir.

Eina ferð, dóttirin Edna arbeiddi umborð á Smyrli, kom Jona Henriksen til avgreiðsluna at bíleggja